# Dimmalætting

Stovnað 1878

Ábyrgdarblaðstjóri: Benny Samuelsen
Útgevari: A/S Færø Amtstidende's Bogtrykkeri


## *Javnaðarflokkurin kókar*

At tað skuldi eitt vánaligt løgtingsval til, áðrenn Javnaðarflokkurin skilti, hvussu langt burtur av rættari kós hann var farin, er óskiljandi fyri okkum onnur.

At førdi politikkur sosialistamanna var farin so langt av leið, sum bert sosialistar eystanfyri fyrrverandi Jarntjaldið kunnu fara, høvdu javnaðarhøvdingarnir í Føroyum onga sum helst føling við.

Teir hildu væl stóð til. At veljarin við valúrslitinum 7. juli vrakaði reyða flokkin, var ikki til at trúgva. Tað mátti vera skeivt.

Veljarin hevur altíð rætt, plagar slagorðið hjá politikkarum vanliga at vera - eisini tá teir verða vrakaðir. Hetta skiltu fleiri av javnaðarhøvdingunum ikki valkvøldið. Tað kundi ikki bera til, at fólk, sum annars í mong Harrans ár høvdu stuðlað teimum í øllum, eisini vánaligu avgerðum teirra, nú knappliga ikki vildu hava teir meir.

Veljarin kundi ikki hava rætt hesaferð!

At lurta eftir meiniga manninum um støðuna í landinum, skuldi verið tað, sum javnaðarflokspolitikkurin var grundaður á.

Men tað hava javnaðarleiðarar havt trupult við at skilja. Enntá undir sjálvum valstríðnum fyri opnum skíggja, tendraði løgmaður, tá valevni frá øðrum flokki nevndi, hvussu ringt fólk hava tað í landinum í dag. Eitt er, at tey ikki hava tak yvir høvdið, mugu búgva hjá familju ella flyta í onnur lond. Annað er, at tað snýr seg um at yvirliva. Matartuggan vantar á borðið í mongum húsarhaldum, og fíggjarlig hjálp fæst ikki longur. Allar royndir hesum viðvíkjandi eru til fánýtis. Hin neyðstaddi følir seg hildnan fyri gjøldur við at mala frá einum stovni til annan fyri at fáa nøkur oyru til familjuna. Men har er eingin hjálp. Ein biddaragongd uttan enda.

Hetta er veruleiki.

Men ikki fyrr enn nú, hevur Javnaðarflokkurin skilt tað - og hevur umborið seg við, at ov høgt var frá flokstoppi og niður á gøtuna.

Køldu gulldagarnir í landsstýrinum hava kostað nógv.

Tó er nógv fyri, at leiðararnir ikki skuldu skilja støðuna, fyrr enn onkur teirra merkti ferilin av øllum tí ringa, tá teir vaknaðu við kaldan dreym valkvøldið.

Úrslitið hevur ført til mikið rok innanveggja í Javnaðarflokkinum, serliga eftir at avleggarin, Verkamannafylkingin, gjørdist veruleiki og fekk tríggjar mans valdar.

Tað eru mong ár síðani, verkamannarørslan fór at prutla undir lokinum í Javnaðarflokkinum, men hvørja ferð eydnaðist ovastu leiðsluna at sløkkja og steðga prutlinum.

Hesa ferð eydnaðist hetta ikki. Verkamannafylkingin gjørdist banamaður Javnaðarfloksins. Nú er vent í holuni.

Tað er í Javnaðarflokkinum at prutlið er komið uppá kók.

## Andlát og tøkkir

†

**JARÐARFERÐIN**
hjá
***Børge Petersen***
adjunktur á Føroya Læraraskúla

verður úr Havnar kirkju
leygardagin 23. juli kl. 13.

*Bjarni, Einar, Hans og Margretha*

Tey, ið ætla at senda blómur ella krans kunnu ístaðin lata eina gávu inn á konto í Føroya Sparikassa



Eg og foreldur míni takka øllum, sum gleddu meg á konfirmatiónsdegnum 27.3.94.

Kærastu heilsanir
*Kristina Djurhuus Christiansen*
Hellutún 5
Tórshavn

Hjartaliga takki eg øllum,
ið mintust meg 4/7-94.

*Joen Frederik Djurhuus*

## Lýsingar í Dimmalætting

**Lýsingaravgreiðsla:**
Avgreiðslan er opin mánadag-hósdag kl. 8-17.
Fríggjadag kl. 8-16. -leygardag er stongt.
Telefonnummar: 11212. Telefax: 10941.
Postadressa: Smyrilsvegur 13,
Postboks 19, 110 Tórshavn.
Automatisku telefonsvararamir eru opnir uttanfyri avgreiðslutíð fríggjakvøld. Leygardag eru telefonsvararamir opnir frá kl. 8.

**Vanligar treytir:**
Síðustødd: 8 teigar á 43x520 mm. 1/1 síða 4.160 mm
Útsjónd: Lýsingar, sum eftir blaðsins meti kunnu mistakast fyri blaðtilfar, skulu merkjast við orðinum: Lýsing, sum verður roknað uppí lýsingamátið. Orðið INSERAT verður ikki góðtikið. Innlatingarfreist fyri lýsingar: Sí niðanfyri.

**Fyrivarni:**
Innihaldið í lýsingunum má ikki stríða móti galdandi lógum.
Ábyrgdina fyri hesum hevur lýsarin. Blaðið tekur sær rætt til at sýta at taka lýsingar við, sum blaðið metir óynsktar.
Teknisk viðurskifti og umhugsan fyri lesarum og lýsarum ger, at blaðið má tilskila sær rætt til at
1. gera smærri týdningarleysar broytingar í lýsingum hvat teksti og uppsetan viðvíkir,
2. skjóta út eina lýsing til seinni blað.
Litlýsingar kunnu bert takast við, um teknisku viðurskiftini loyva tað.

Endurgjald fyri møguligar villur, sum lýsarin sjálvur ikki hevur skyldina fyri, er vanliga prísavsláttur eftir blaðsins meti um virðisminkan av lýsingini, men í mesta lagi at lýsingin, ella líknandi lýsing, verður tikin við aftur seinni ókeypis. Villur, sum standast av vánaligum lýsingartilfari hevur blaðið onga ábyrgd av.
Lýsingar, sum verða innteiefoneraðar, verða altíð lisnar uppaftur, og blaðið tekur tí onga ábyrgd fyri villur sum koma á henda hátt.
Lýsingar um verilsir ynskist ella íbúð ynskist mega gjaldast frammanundan, um lýsarin ikki sjálvur hevur telefon og/ella fastan bústað.

**Innlatingarfreist fyri lýsingar**

| | Týsdagsblaðið | Hósdagsblaðið | Leygardagsblaðið |
|---|---|---|---|
| ¼ síða ella størri | Frí. kl. 12 | Týs. kl. 12 | Hós. kl. 12 |
| Minni enn ¼ síða | Frí. kl. 14 | Týs. kl. 16 | Hós. kl. 16 |
| Smálýs. 1 teig | Mán. kl. 10 | Mik. kl. 10 | Frí. kl. 10 |

Litlýsingar og lýsingar við frammihjáplássi mega latast inn dagin fyri omanfyri nevndu freist.

## Tillukku við barninum



*Hvønn leygardag ynskir Dimmalætting foreldrum tillukku við litla barninum, annaðhvørt bara í teksti ella í teksti og myndum. Hetta gera foreldrini sjálvi av. Merk brævbjálvan "Tillukku við barninum", skriva navn og adressu, so vit kunnu senda myndina aftur sum skjótast. Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd í blaðið. Vit skulu hava myndirnar í seinasta lagi fríggjamorgun. Um foreldrini ynskja tað, kann myndafólk frá blaðnum taka myndina ókeypis. Ring 11212, og vit avtala nærri.*

## Orðið



*Les Orðt. 17,27-18,4*

**TOSA MINNI, SIG MEIR**

*»Um tað so er dárin, verður hann roknaður fyri vísmann, táið hann tegir.« Orðt. 17,28*

Í 1972 rendu tvey oljutangaskip saman undir Golden Gate Bridge (California), og 3,8 milliónir litrar av olju runnu út í buktina. Doyggjandi fuglur, fiskur og kópur rak á land. Vanlukkan gjørdi, at maður, sum búði í nánd av brúnni, setti sær fyri at liva einfaldari lív við at brúka minni av náttúrunnar kraftarkeldum. Fyrst fekk hann sær fyri at fara til gongu allastaðni, hann ætlaði sær. Árið eftir setti hann í seg ikki at mæla eitt orð. Tað gjørdi hann til tess at vekja fólkaans fyri stórskaða á umhvørvið. Í samfull 13 ár talaði hann bert ta einu ferðina: Hann rópti á foreldrini at siga teimum um ætlanir sínar at fara pílagrímsferð til gongu.

Við orðaleysum samskifti hevur hann ikki einans prógvað, at longri hann tagdi, tess betur fekk hann lurtað eftir tí, hini høvdu at siga, men hevur eisini nátt endamálinum við tøgnini: At fáa fjølmiðlarnar til at sýna málinum upiboman ans.

Ikki fari eg kortini at mæla til líknandi, harðrend mótmælistiltøk; men tað, sum maðurin uppdagaði er eisini galdandi fyri okkum. At tala minni kann hjálpa okkum til ikki bert at hoyra meir, men eisini at verða betri hoyrd. Oftani er tøgnin bæði tungufimari og ljóðligari enn orðini, vit siga.

Sálomon leggur ofta dent á henda sannleika. Hava vit tikið eftir ráðum hansara? Minst til, at hann skrivaði Guds vegna. Vísi persónurin hoyrir og verður hoyrdur, tí hann veit, bæði nær hann skal tala, og nær hann skal tiga. Og so eigur hann ein máta at tala uppá, sjálvt tá hann tigur. Vísdómur er tað at tala minni til tess at siga meir.

## Viðmerkingar til aktuell mál

# Lagnustund Javnaðarfloksins

Í Sosialinum nr. 134 hevur tíðindamaður úr Javnaðarflokkinum eina grein um orsøkirnar til vánaliga valúrslitið hjá Javnaðarflokkinum og mælir til, at flokkurin tekur í egnan barm og fer undir neyðugu sjálvrannsakanina.

Sagt verður, at Javnaðarflokkurin varð stovnaður sum ein sosialdemokratiskur arbeiðaraflokkur. Hetta kann væl vera, men úrslitið av politikkinum er tá saman um kemur, sum tíðindamaðurin sigur »ein lønarbeiðarafamilja, sum ikki ein tann einasta mánað fær endarnar at røkka saman« og »í mongum førum er tað vorðið eitt helviti at búgva í Føroyum.«

Eisini kemur tíðindamaðurin inn á, hvat eyðkennir leiðslu Javnaðarfloksins: Ein ótrúlig arrogansa - eitt minni gott, fyri ikki at siga vánaligt, handalag - ein ótrúligur fjarleiki og vantandi kunnleiki til livikorini hjá føroyinginum. Heldur onki gjørdi Javnaðarflokkurin fyri at lætta um skatta- og avgjaldstrýstið.

Merkiligt at hetta skal koma óvart á ein tíðindamann, tí ein politikkur, sum hevur til endamáls at vaksa um skattatrýstið, at tað almenna skal loysa møguligar uppgávur, og tað liggur frammarliga at seta floksfelagar í flest møgulig almenn størv, vil sum frá líður júst hava tær avleiðingarnar, sum tíðindamaðurin konstaterar í nevndu grein. Tað er ein søgulig sannroynd, at lond, sum eru stýrd á ein slíkan hátt, enda í fíggjarligum og moralskum forfalli.

Vónandi endar sjálvrannsakan Javnaðarfloksins í hesum erkennilsi.

Men nú endurtekur so søgan seg. Stovnað varð ein sokallað verkamannafylking, ið skal taka sær av veruligu áhugamálunum hjá verkafólki, nevniliga at skapa produktiv arbeiðspláss.

Tíverri sær út til, at nissan er flutt við inn í verkamannafylkingina.

Ein av umboðunum hjá fylkingini vil ikki, at almenni sektorurin skal minka - tvørturímóti. Vinnur hetta sjónarmið frama, so koma vit framvegis at liggja undir verðsins hægsta skattatrýsti, sum kemur at súgva alla orku úr samfelagi okkara.

Tað er at vóna, at hini bæði tingfólkini fyri fylkingina klára at halda fast við teirra aðalmál til valið, nevniliga at útvega produktiv arbeiðspláss og at fáa skil á almennu umsitingina í Føroyum.

Tórshavn, 18.07.1994

**bak.**

# Undirgrundin – ríkisfelagsskapurin

Tað frættist herfyri í fjølmiðlunum, at danska stjórnin partvíst vildi hava umsitingina av føroysku undirgrundini aftur.

Leingi hevur tað verið so, at ríkisfelagsskapurin í høvuðsheitinum bert hevur verið til okkara fyrimuns, og seinastu árini í so stóran mun, at vit eru vorðin illa umtókt manna millum í Danmark. Okkara umdømi er vorðið so vánaligt, at tað er vorðin ein skomm at viðganga, at ein er føroyingur.

Tað tekur tíð at uppbyggja eitt gott umdømi, meðan tað er skjótt at oyðileggja. Okkara vánaliga umdømi gongur ikki bert út yvir vanligar føroyingar í Danmark og í útlondum, men so sanniliga eisini út yvir føroyskt vinnulív.

Nú fáa vit ein søguligan tjans at vísa, at vit í ríkisfelagsskapinum ikki bert eru biddarar og einans hugsa um okkara egna fyrimun, men at vit vilja lata burturav, tá vit hava møguleika til tess.

Vit eiga í komandi samráðingum við donsku stjórnina greitt at boða frá, at sjálvandi skulu danir á jøvnum føti við føroyingar nýta gott av og gera brúk av tí oljuríkidømi, sum kanska finst í okkara undirgrund.

Hetta vil ikki verða nakað afturstig fyri okkum sum tjóð ella sjálvræði, tvørturímóti kann hetta verða við til skjótt at vinna okkum umdømi aftur sum ein tjóð, ið er realistisk og rímilig.

Heldur ikki man hetta fara at verða nøkur ring loysn, tí sjálvandi vilja danir annars treyta sær, at inntøkur frá oljuni verða mótroknaðar í blokkstuðlinum. Heldur ikki má gloymast, hvat goodwill og betrað umdømi føroyskt vinnulív kann fáa av hesum stigi bæði í Danmark og uttanlands.

So leingi vit eru í einum ríkisfelagsskapi, eigur hetta at vera til fyrimuns fyri báðar partar. Alt annað er mannminkandi og kryplandi fyri fólkasálina.

Heitt verður á komandi samgongu um uttan himpr at taka hetta stigið, so vit so smátt kunnu fara at bera høvdið hægri aftur.

Tórshavn, 18.07.1994

**bak.**